gult14 cyan14 magenta14 svart14



# John Rødgaard vísti klassan

**Javnleikur var nóg mikið í seinasta umfarinum, og altjóða meistarin tók ikki nakrar kjansir, tá hálva stigið skuldi fáast til høldar**

TALV
*Jákup Mørk*

Alla farnu viku royndu frægastu føroysku telvararnir at gera av, hvør teirra skuldi kunna rópa seg nýggjan føroayameistara.

At talan skuldi verða um ein nýggjan meistara var greitt longu undan kappingini, tí meistarin frá í fjør, Flóvin Tór Næs, tók ikki lut í kappingini.

## Langur tvídystur

Longui tíðliga í kappingini tóktist greitt, at kappingin fór at standa ímillum John Rødgaard og Eyðun Nolsøe. Eftir triðja umfar høvdu teir lagt seg einsamallar á odda, og javnstøðan teirra millum helt seg fram til sætta umfar. Tá vann Eyðun sítt talv á Jóan Hendrik Andreasen, meðan John heldur óvæntað mátti taka til takkar við javnleiki móti Martini Poulsen, og hetta legði veruligt trýst á Rødgaard undan sjeynda umfari, har mótstøðumaðurin var Eyðun Nolsøe.

Tað eydnaðist tó John at vinna hendan avgerandi dystin, og tá Eyðun í áttanda umfarinum tapti móti bróðursoninum, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, var alt lagt væl til rættis fyri John Rødgaard undan seinasta umfarinum.

Her hevði nýkosni føroyameistarin dyst móti Jens Kristiani Hansen, og hálva stigið í hesum dystinum rakk altso til gullið. So kundi tað gera tað sama, at Eyðun í sínum seinasta dysti fekk fulla úrtøku móti Martini Poulsen.

## Sterkur bólkur

Annars var merkisvert, at føroyingurin við hægsta ratingtalinum, John Arni Nilssen, mátti taka til takkar við einum fjórða plássi. Hálvt annað stig aftan fyri John, og hálvt stig frá Ólavi Simonsen á triðja plássinum.

Hetta sigur tó eisini nakað um, hvussu sterkur landsliðsbólkurin var í ár. Hóast Flóvin, sum áður nevnt, ikki fekk tikið lut í ár, so varð bólkurin framman undan mettur sum ein hin sterkasti nakrantíð, og í fleiri av dystunum var eisini greitt, at munurin ímillum luttakararnar var sera lítil. Eisini tí at kalla allir megnaðu at taka stig frá hvørjum øðrum.

Endaliga støðan í landsliðsbólkinum framgongur av yvirlitinum her á síðuni, eins og úrslitið av innanhýsis dystunum kunnu lesast.

## Olaf vann

Í almenna bólkinum stóð dysturin um gullið alla tíðina millum Olaf Berg úr Havnar Talvfelag og Terja Petersen úr Klaksvíkar Talvfelag.

Olaf var alla tíðina á odda í kappingini, men eftir at hann tapti fyri Terja, stóð nógv á, áðrenn hann kundi rópa seg føroyameistara við sjey stigum fyri átta dystir. Tað kom sostatt at kosta dýrt hjá Terja, at hann tíðliga í kappingini misti stig móti tveimum at lægru rataðu telvarunum, tí tapið hjá Olafi fyri Terja vigaði ikki eins nógv í so máta.

Herluf Hansen úr Havnar Talvfelag vann triðja plássið í harðari kapping við Andreas Ziska, eisini úr Havn, og vóru tað sostatt teir fýra telvararnir, sum høvdu hægstu ratingtølini, sum endaðu á ovastu sessunum í almenna bólkinum.

Samlaða yvirlitið yvir almenna bólkin sæst annars á heimasíðuni hjá Talvsambandinum, www.faroechess.com.

## Eingin ivi

Hjá unglingunum var ongan tíð nakar ivi um, hvør skuldi fara at rópa seg føroyameistara eftir kappingina. Hans Kristian Simonsen úr Kollafjarðar Talvfelag hevði nógv hægsta rating talið í bólkinum, og hann misti eisini bert tað eina stigið í sínum dystum.


*John Rødgaard skapti sær avgerandi fyrimun, tá hann vann dystin móti Eyðun Nolsøe*

Nummar tvey við seks stigum gjørdist heldur óvæntað Hans Erik S. Jensen úr Róki, meðan Karl M. S. Jensen, eisini úr Róki, gjørdist nummar trý.

Í eldrabólkinum eydnaðist tað Dánjal Petur Højgaard úr Vestmanna Talvfelag at finna fyrsta plássið við fimm stigum, framman fyri Luitjen Apol úr Havnar Talvfelag, sum hevði hálvt fimta stig. Nummar trý gjørdist her Hans Petersen úr Vestmanna Talvfelag við fýra stigum.

| Nr. Navn | Rating | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | Íalt | # |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Ey›un Nolsøe, KTF | 2185 | 10 / 1 | 2 / 1 | 9 / 0,5 | 4 / 0,5 | 5 / 1 | 6 / 1 | 7 / 0 | 8 / 0 | 9 / 1 | 6,0 | 2 |
| 2. John Arni Nilssen, HT | 2345 | 9 / 1 | 3 / 0 | 10 / 1 | 3 / 0 | 4 / 0,5 | 5 / 0 | 6 / 1 | 7 / 0,5 | 8 / 1 | 5,0 | 4 |
| 3. Jens Kristian Hansen, TT | 2150 | 8 / 0,5 | 9 / 1 | 1 / 0,5 | 2 / 1 | 10 / 0 | 4 / 0,5 | 5 / 0,5 | 6 / 0 | 7 / 0,5 | 4,5 | 5 |
| 4. Ólavur Simonsen, KTF | 2190 | 7 / 0 | 8 / 1 | 9 / 1 | 1 / 0,5 | 2 / 0,5 | 8 / 0,5 | 10 / 0,5 | 5 / 1 | 6 / 0,5 | 5,5 | 3 |
| 5. Rani Nolsøe, KTF | 2185 | 6 / 1 | 7 / 0 | 8 / 0,5 | 9 / 1 | 1 / 0 | 2 / 1 | 3 / 0,5 | 4 / 0 | 10 / 0 | 4,0 | 8 |
| 6. Jóan H. Andreasen, HT | 2090 | 5 / 0 | 10 / 0,5 | 7 / 0,5 | 8 / 0 | 9 / 1 | 1 / 0 | 2 / 0 | 8 / 1 | 4 / 0,5 | 3,5 | 9 |
| 7. IM John Rødgaard, VT | 2295 | 4 / 1 | 5 / 1 | 6 / 0,5 | 10 / 0,5 | 8 / 1 | 9 / 0,5 | 1 / 1 | 2 / 0,5 | 3 / 0,5 | 6,5 | 1 |
| 8. Carl Eli Nolsøe Samuelsen, HT | 2130 | 3 / 0,5 | 4 / 0 | 5 / 0,5 | 6 / 1 | 7 / 0 | 10 / 0,5 | 9 / 0,5 | 1 / 1 | 2 / 0 | 4,0 | 7 |
| 9. Martin Poulsen, HT | 2115 | 2 / 0 | 3 / 0 | 4 / 0 | 5 / 0 | 6 / 0 | 7 / 0,5 | 8 / 0,5 | 10 / 0,5 | 1 / 0 | 1,5 | 10 |
| 10. Heini Olsen, KTF | 2290 | 1 / 0 | 6 / 0,5 | 2 / 0 | 7 / 0,5 | 3 / 1 | 8 / 0,5 | 4 / 0,5 | 9 / 0,5 | 5 / 1 | 4,5 | 6 |

# Tey fremstu eiga heimavøll

**Fuglfirðingar, sum eiga einasta 2. deildarliðið í fjórðingsfinaluni, skulu spæla á útivølli ímóti HB ella NSÍ**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Fjórðingsfinalurnar í kappingini um løgmanssteypið verða spældar sunnudagin. Hvør skal spæla ímóti hvørjum er ikki greitt enn. Lutur verður kastaður um tað í Útvarpi Føroya fríggjamorgunin.

Men hóast tað bara verða stívliga tvey samdøgur frá lutakastinum og til dystirnir skulu avgreiðast, so er tað longu greitt, hvørji lið fara at hava heimavøll sunnudagin, og hvørji lið fara at spæla á útivølli.

B68, HB og NSÍ fara at spæla á heimavølli, tí tey vunnu teir tríggjar bólkarnar. KÍ fer at spæla á heimavølli, tí tað er greitt, at klaksvíkingar vórðu bestu tveyararnir.

Hini liðini í hattinum komandi fríggjamorgun verða B36, GÍ, ÍF og VB. Hesi liðini skulu út at ferðast. Hvagar tey skulu, verður greitt eftir lutakastið. Men tað er longu nú greitt, hvagar tey ikki skulu.

Ásetingarnar siga, at bólkavinnararnir skulu hava heimavøll, og tað hevur eisini verið galdandi seinastu, at tað skal ikki bera til at møta liðið í fjórðingsfinaluni, sum tú hevur spælt ímóti í bólkaumfarinum. B68, KÍ og ÍF eru komu víðari úr sama bólki. Tí er tað greitt, at ÍF, sum er einasta 2. deildarliðið í kappingini, og tískil ivaleyst fer at verða mett sum léttasta mótstøðuliðið, ikki skal til Klaksvíkar og ikki út á Toftir. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað verður HB ella NSÍ, sum komandi sunnudag fer at fáa vitjan av fuglfirðingum.

Møguleikarnir fyri mótstøðuliðum hjá B68 á Svangaskarði eru hesir: B36, GÍ og VB. Møguleikarnir fyri mótstøðuliðum hjá HB í Gundadali eru ÍF og VB. Møguleikarnir fyri mótstøðuliðum hjá KÍ eru B36, GÍ og VB.

NSÍ skal hava heimavøll, og fríggjamorgunin verður greitt, um tað verða teir, sum skulu fáa vitjan av ÍF, um teir skulu spæla ímóti B36 ella GÍ. Gøtumenn eru teir, sum royna at verja løgmanssteypið. Í finaluni í fjør vunnu teir 1–0 á HB. Tað er framvegis møguleiki fyri endurtøku av finaluni í fjør, tí tað er longu nú greitt, at HB og GÍ, sum vóru í bólki saman, ikki fara at hittast í fjórðingsfinaluni komandi sunnudag.

Sambært upplýsingunum í FSF álmanakkanum verður finalan í kappingini um løgmanssteypið ólavsøkudag. Finalan verður spæld á Tórsvølli.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# ÍF kløkkaði klaksvíkingar

**Eftir stóru manningarligu útskiftingina vístu páskaumførini, at KÍ ikki er illa statt við fólki**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar hava vunnið sær sess í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. Tað eru teir sjálvsagt fegnir um. At teir eiga heimavøll komandi sunnudag eigur at hava við sær, at tað eru eins góðir møguleikar at vinna seg í hálvfinaluna, sum tað eru ikki at gera tað.

Í Klaksvík hava tey verið ivasom um, hvussu tað í ár fór at skerast hjá Sivic og hansara monnum, eftir at einir átta ella níggju spælarar frá liðnum í fjør eru burtur.

Hóast KÍ er komið í fjórðingsfinaluna, so tykist hesin spurningurin ikki rættuliga at vera svaraður enn.

Eitt er, at KÍ hevur spælt tveir tættar dystir ímóti B68, og at teir hava vunnið tvær ferðir ímóti B71.

Ivamálið hvat KÍ stendur fyri, tá nógv leikar á, var sjónskt leygardagin, tá ÍF var í Klaksvík. Fuglfirðingar spæla í 2. deild, og tað gekk, sum tað skuldi, tá KÍ í 1. hálvleiki kom framum 2–0. Fríðin Ziskason, sum í páskadystunum hevur spælt seg nærri plássi í útgangsstøðuni, stútaði tað fyrra eftir horna, og Hjalgrím Elttør skoraði hitt seinna eftir innlegg úr høgru.

Men so var tað, at tríggir klaksvíkingar klossaðu í einki vandaleysari støðu. Heini Heinason kom ímillum, prikaði bóltin til Høgna á Lakjuni, sum var púra leysur. Hann skoraði, og dystargongdin var í langa løtu ikki serliga sannførandi hjá KÍ. Tá var tað, at fótbóiltsglaðu norðoyingarnir stóðu ivandi og sóu sítt lið. Í ein lítlan hálvan tíma var tað ÍF, sum so at siga setti dagsskránna, og útjavnandi málið hekk í luftini.

Eftir upplegg frá Fríðini Ziskason økti Hjalgrími Elttør til 3–1, og ein annar av ungu klaksvíkingunum, miðvallarin Símun Joensen, staðfesti til 4–1, tá hann við fínum dúkkandi skoti sendi omanfyri Ken Bærentsen í ÍF málinum.

## Breitt grundarlag

Merkisvert hevur tað í páskadystunum verið, at fleiri av teimum, sum hava verið roknaðir sum stuðulsspælarar hjá KÍ, hava verið burturfrá, og at tað kortini hevur gingið hampuliga væl.

Jan Andreasen, sum er verjuálit, hevur als ikki spælt, tí hann hevur trupulleikar við tjúkkanum. Harley Bertholdsen hevur ikki spælt nógv, tí hann hevur havt trupulleikar við rivjabeininum, og Símun Waag Høgnesen, sum fyri stuttum er komin aftur av flatlondum, er eisini skaddur.

Umframt omanfyri nevndu ungu menninar hevur Erling Fles spælt nógv, og hann hevur staðið seg væl. Eisini á høgra vongverjanum har hann hevur fallið væl til, tá tað hevur borist frá hjá Harley Bertholdsen.


*Hóast klaksvíkingar vórðu kløkkaðir, so eydnðaist teimum kortini at vinna ein hampuliga sannførandi sigur*

Mynd: SjH

# Tætt á Toftum

**Fleiri av stuðulsspælarunum hjá B68 hava spælt lítið, tí teir hava verið skaddir og sjúkir**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

B68 skal hósdagin spæla útsetta dystin ímóti B71. Hóast ein dystur restar, so er tað longu greitt, at toftamenn hava vunnið sín bólk. Einasti dysturin, har teir ikki hava fingið fulla úrtøku, var 2. páskadag, tá KÍ vitjaði.

Tað endaði 1–1, og tað tóktist báðir partar nøgdir við. Jan Petersen legði tíðliga í 1. hálvleiki B68 framum við brotssparki. Allan Joensen, sum var aftastur í KÍ verjuni, var óansin í temjing, fyrrverandi liðfelagin hjá honum, Arnold Joensen, stakk seg framum, Allan krøkti beinini undan honum, og dómarin segði brotsspark. Jan Petersen avgreiddi úr ellivu metrum.

KÍ javnaði í 2. hálvleiki. Hjalgrím Elttør er vorðin stóri málslúkurin hjá KÍ (at ungi maðurin framvegis misnýtir upplagdar møguleikar var sjón fyri søgn á Toftum). Hesa ferð var hann staddur í vinstru, tá hann knappliga smekkaði dúkkandi skot omanfyri eitt sindur uttarlaga stadda B68 málverjan.

## B68 trupulleikar við fólkinum

B68 hevur tókst hava nógv og gott fólk, og tað hevur gingið væl hjá teimum í steypakappingini. Ikki minst í miðverjuni hava teir verið sannførandi. Hóast teir hava roynt eitt sindur av hvørjum í longum fótbóltslívum, so hava Hans Fróði Hansen og Jan C. Dam í bólkaumfarinum verið sannir brandar.

Longri frammi á vøllinum hevur ikki verið so væl statt við fólki hjá B68. Súni Fríði Johannesen hevur als ikki spælt í páskavikuni. Hann hevur havt trupuleikar við lærkrikanum. Øssur Hansen hevur heldur ikki spælt allar dystirnar. Hann hevur verið smáskaddur. Marcello hevur einki spælt. Hann hevur trupulleikar við meniskinum. Í gjár skuldi knæið kannast á landssjúkrahúsinum.

## Stinnir heima

Skírisdag vóru fuglfirðingar á Svangaskarði. Munurin var ikki so ógvuliga stórur, men tað var ongantíð ivi um, hvat av liðunum ætlar sær at vera við í stríðnum um heiðursmerkir í bestu deildini, og hvat av liðunum er í ferð við at fyrireika seg til at vinna sær sess í bestu deildini.

Málmøguleikarnir vóru ikki so ógvuliga nógvir, men B68 fekk tvey mál. Hitt fyrrra skoraði Mortan Hansen eftir innlegg frá Marlon Jorge úr høgru, og hitt seinna var Øssur Hansen meistari fyri.

# Sandoyingar sørir í stigum

**Eftir trilvandi byrjanina í bólkaumfarinum og nógvar skaðar og sjúku kendi Kári Reynheim seg noyddan at seta seg sjálvan á liðið í trimum dystum**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Higartil hevur tað ikki hilnast væl hjá B71. Sandoyingar eru framvegis sørir í stigum. Teir hava ein dyst eftir í bólkaspælinum – á Toftum komandi hóskvøld – og tað eru teir ivaleyst væl nøgdir við. Ikki tí teir hava nakran møguleika í steypakappingini, men tí tveir av spælarunum hjá teimum harvið fáa møguleikan at sita leikbann av sær. Og tað hevur stóran týdning, áðrenn tað verður farið undir landskappingina.

ÍF vann 2. páskadag 4–2 á heimavølli ímóti B71. Heini Heinason og Eyðolvur R. Petersen løgdu fyrrapartin av fyrra umfarinum heimaliðið framum 2–0, men so svaraði B71 aftur. Símun Hansen minkaði um munin, og tveir minuttir eftir steðgin javnaði Bárður Bærentsen. Sandoyingar hildu seg hava fingið fatur á rætta endanum, men so heilkiksaði hjá teimum. Hans Jørgen Djurhuus fekk seinna gula kortið, og í minuttinum aftaná – í tí 54. – skoraði Eyðolvur R. Petersen.

Í 65. minuttir økti Heini Heinason til 4–2, og tólv minuttir fyri leiklok fekk Jón Brekku beinleiðis reytt kort. Sandoyingar hildu talan var um harðan dóm.

## Kári ímóti Jóannesi

Kári Reynheim og Jóannes Jakobsen hava spælt nógv saman: á landsliðnum, í HB og eisini í norskum fótbólti.

Bæði teir sjálvir og onnur munnu halda, at teirra besti fótbóltsaldur er langt síðani farin. Á Sandi hava fleiri spælarar verið skaddir, og influensan hevur gjørt nógv um seg. Skírisdag, tá KÍ vann 2–1 á Sandi, kendi Kári Reynheim seg noyddan at seta seg sjálvan á vøllin síðstu løtuna.

KÍ vann 2–1, eftir at fyrstu 80 minuttirnir vóru málleysir. Ove Nysted skoraði bæði KÍ málini, og Bárður Bærentsen skoraði fyrstu ferð fyri B71, sum hevði slept fløtu verjuni og spældi við dýpd og nógvum fólki aftanftyri bóltin.

Tá B68 var á Sandi páskaaftan var Kári Reynheim við allar 90 minuttirnar, og hann dugdi framvegis at krúlla og fótbóltsskilinum bilti einki. Síðstu løtuna skifti Jóannes Jakobsen seg inn í B68 verjuna fyri Hans Fróða Hansen, sum var smáskaddur, og so hugdu tær báðar Landskrona kempurnar upp á hvønn annan eina lítla løtu.

Sandoyingarnir høvdu nógv fólk aftanfyri bóltin, og málmøguleikarnir vóru tískil ikki so nógvir. Tíggju minuttir vóru farnir, tá Fróði Benjaminsen – eftir sending frá Marlon Jorge – við góðum skoti úr høgru skoraði, og tað restaðu trettan minuttir, tá Mortan Hansen við stútara eftir innlegg úr vinstru enn eina ferð vísti, at hann verður góður fongur hjá toftamonnum.